**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 27. apríl 2015, kl. $19^{00}$.**

| | |
|---|---|
| **Bygdarráðslimir á fundi:** | Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, Øssur Christiansen, og John Zachariassen |
| **Skrivari:** | Maud Poulsen |

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Durita á Heygum tann 16. apil 2015 boðað frá, at henni frá at møta á fundinum vegna arbeiði.
Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 22. apríl. Hann játtaði at møta á fundinum.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssuri Christiansen sum tiltakslimur.

Borgarstjórin kunnaði um, at síðani skráin varð løgd, er eitt mál komið avtrat: umsókn frá Bátstevnunevndini um stuðul til Bátastevnuna 2015. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um loyvi at seta málið á skránna sum mál 136.
Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 133**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Annu Dalsgaard og Leif Klein um sundurbýti aav ognini matr. nr. 8a í Vestmanna.
J.nr. 01.04.00-G01-3-15

**Viðv. 133**
Hilbert Elisson skjeyt at taka málið av skrá og beina tað aftur í nevnd.
Uppskotið hjá Hilbert Elisson var einmælt samtykt.

**Mál 134**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um uppskot til dagføring av reglugerðini fyri kirkjugarðarnar í Vestmanna.
J.nr. 04.31.00-P00-1-15

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 21. apríl 2015 uppskot til dagføring av reglugerðini fyri kirkjugarðarnar í Vestmanna.
Nevndin samtykti at mæla bygdarráðnum til at samtykkja dagført uppskot til reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Vestmanna.

Størsta broytingin í uppskotinum er, at ætlanin er at avtaka kirkjugarðsnevndina, og í staðin at leggja uppgávuna til umsitingina hjá Vestmanna Kommunu og Trivnaðar- og umhvørvisnevndina.
Aðrar broytingar í uppskotinum eru dagføringar, sum standast av, at so long tíð er liðin, síðan reglugerðin seinast varð dagførd.

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá kirkjuráðnum í Vestmanna Kirkju og hjá kirkjugarðsnevndini. Tá ið freistin at koma við viðmerkingum var úti tann 20. apríl, var ein viðmerking komin. Viðmerkingin var frá kirkjugarðsnevndini, sum tók undir við fyriliggjandi uppskoti.

**Viðv. 134**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 135**
Tilmæli frá Mentanarnevndini um uppskot um at seta á stovn lektiuhjálp í Vestmanna Skúla.
J.nr. 17.00.00-G01-1-14

Mentanarnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. apríl 2015 uppskot um at seta á stovn lektiuhjálp í Vestmanna Skúla.

Nevndin mælir bygdarráðnum til at samtykkja, at lektiuhjálp verður skipað í Vestmanna Skúla sum ein fyribils roynd á heysti 2015, og at kr. 50.000 verða játtaðar til endamálið á endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri 2015, um upphæddin ikki kann finnast innan fyri verandi karmar.

Ynski er, at tilboðið um lektiuhjálp verður skipað beint eftir skúlatíð tveir dagar um vikuna, 3 tímar hvørja ferð.
Málið hevur verið til ummælis hjá Skúlastýrinum fyri Vestmanna Skúla, sum tekur fult undir við tí.
Víst verður eisini til upprit, sum er hjáløgd í málinum.

**Viðv. 135**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 136**
Umsókn frá Bátastevnunevndini um stuðul til Bátastevnuna 2015.
J.nr. 20.15.00-Ø40-1-14

**Viðv. 136**
Pauli T. Petersen skjeyt upp at stuðla Bátastevnuni 2015 við kr. 30.000 at brúka til lýsingarátøk, skelti, v.m.
Uppskotið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.45

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Malan Stórá

Durita á Heygum John Zachariassen